vikurnar.

Vit ferðast runt í økinum, sum vit hava fingið til uppgávu at eygleiða. Her royna vit at koma í samband við fólk frá ymiskum samfelagsløgum og positiónum.

Vit hittu ein kvinnuligan politikkara, sum rættuliga hevur bein í nøsini. Hon er ikki á nakran hátt rædd fyri at taka upp bardagan við korrupta politiska umhvørvið her.

Vit hava eisini ferðast langt inn í junglina fyri at vitja ein av teimum smærru minnilutabólkinum her, khashiar, sum búgva báðu megin markið millum Bangladesh og India.

Har tóku tey eisini sera væl ímóti okkum. Vit sótu í túninum hjá høvdinganum og ótu betelnøtur og tugdu betelbløð saman við fólkinum. Hetta var ógloymandi.

Tey greiddu okkum frá síni strategi at fáa tað frá politikkarunum, sum tey vildu hava, hóast har bert vóru 20.000 veljarar. Hetta eru fólk við vilja.

Teir politisku flokkarnar kappast um at fáa teirra atkvøður. Teir royna bæði at lokka tey við peningi og við hóttanum og ræðumyndum. Men teir allarflestu av hesum tearbeiðarum hava øll árini atkvøtt fyri Awami Legaue, sum stóð aftanfyri frígeringina frá Pakistan, og einki fær tey til at broyta hugsan.

## Kvinnurnar væl fyri

Hinduarnir og serliga kvinnurnar í hindusamfelagnum hava ofta eina góða útbúgving, og nógvar av teimum eru skúlalærarar. Tað er stuttligt at síggja, hvussu upptiknar tær eru av valinum, og hvussu stóran dent tær leggja á leiklutin hjá kvinnunum. Tær vóru opnar og hugnaligar, og tær vildu fegnar práta við okkum.

Tann 10. desember var ID, ein muslimsk høgtíð, og vit vóru boðin heim til nýggjar vinir at fáa ta siðbundnu høgtíðarmáltíðina.

Øll, sum hava ráð, slakta eina kúgv ella ein seyð, og býta kjøtið í tríggjar partar. Ein partur fer til tey fátæku, ein til vinir og grannar, sum ikki hava slaktað enn, og restin til familjuna.

So gera tey til eina rúgvu av karry, rís og køkur, og fara so at vitja hvønn annan í tríggjar samfullar dagar.

Morgunmatur verður etin klokkan fimm seinnapartin og døgurðin er kl. 10 um kvøldið. Hesa tíðina kunnu vit ikki arbeiða kortini, tí eingin er á skrivstovuni. So vit hava frí at njóta gestablídnið. Eg kann siga, at bengalar eru eitt einastandandi gestafrítt fólk. Tey eru sera opin móti vitjandi uttan mun til, hvar tey koma frá. Hetta kundu onnur lært av.

Eg havi funnið eina norska missión her. Santalmissiónin hevur eitt lítið samfelag við um 100 kristnum í Moulvibazar. Her hittu vit norsku Marianne, tá vit fóru inn á gólvið. Hon hevur verið her síðan 1980.

## Um Bangladesh

Bangladesh er 144.000 ferkilometrar til støddar, umleið 100 ferðir Føroyar. Men íbúgvaratalið er 150 mill, ella einar 3.000 ferðir Føroyar!

87% av fólkinum er muslimar og 12% hinduar. Smáir minnilutar eru, eisini kristnir.

Landið er eitt tað fátækasta í heiminum. Her er slættlendi, tí er ofta vatnflóð. Størsti parturin av landinum er ikki hægri enn 6 metur yvir havinum. Tað kemur fyri, at 60% av landinum stendur undir í vatni. Landbúnaður er høvuðsvinnan. Her er sera fruktarbart. Tí kundi nógv komið burtur úr, um tað ikki var fyri tær oyðileggjandi flóðirnar Nú er ein ídnaður við at verða bygdur upp.

Seinastu árini er eydnast at bøta nógv um liviumstøðurnar hjá fólkinum. Livialdurin er komin uppá 63 ár, og hetta er ikki so galið í hesum partinum av heiminum.

Upprunaliga gjørdist Bangladesh ein partur av Pakistan í 1947, hóast India lá millum landspartarnar. Men í 1971 var uppreistur og Bangladesh sleit seg leyst av Pakistan, og gjørdist sjálvstøðugur statur.

Men gleðin vardi ikki leingi. Leiðarin av uppreistrinum í 1971, Sheik Rahmann, varð longu myrdur í 1975. Tá tók eitt hernaðarstýri ræðið fram til 1991. Síðan vóru reglulig val fram til 2001.

Val skuldi so vera aftur í 2007. Hetta var avlýst, og landið varð sett í undantaksstøðu við stjóranum fyri tjóðbankanum sum leiðara. Henda stjórnin hevur gjørt nógv fyri at fáa meira skipað viðurskifti. Barst hevur verið móti korruptión eins og dømandi og útinnandi valdið er býtt sundur. Tí er landið betri fyri at fara til val nú.

Lovað varð tá, at val skuldi í seinasta lagi vera innan árslok 2008. Tískil varð val lýst at vera 18. desember. Tá var ein flokkur, sum vildi hava meira tíð til at finna fleiri valevni, og valdagurin varð útskotin til 29. desember.

Linda sigur, at ein partur av teirra arbeiði er at tosa við valevnini hjá teimum ymiskum flokkunum. Valstríðið er byrjað, og undantaksstøðan varð tikin aftur tann 17. desember.

Hon hevur staðið við, síðan tað ætlandi skuldi vera val seinast. Tað hevur ikki verið loyvt fólki at savnast í stórum tali. Tó er undantaksstøðan lutvíst avtikin undan nevnda dag fyri at flokkarnir kundu fáa høvi til at føra valstríð.

Avtøkan av undantaksstøðuni hevur longu ført til, at ungir menn renna í gøtunum við rakstrarrópum. Tí hevur ótti verið fyri samanbrestum.

Minnilutarnir hava kent seg tryggar, men teir siga, at teir vildu heldur havt undantaksstøðuna at vart til valið var av, so tey kunnu fara á val uttan at óttast harðskap og hóttanir.

## Val er ikki bert sum at siga tað

Á okkara leiðum rokna vit tað sum eina sjálvfylgju, at eitt val fer rætt fram. Men soleiðis er tað ikki alla staðni. Tað ber væl til at svika við einum vali. Fyri at eitt val skal verða viðurkent verður skipað fyri óheftum útlendskum eygleiðarum. Hetta eftirlit kann so verða skipað av óheftum stovni sum Europeiska Samveldið.

Her eru eisini greiðar mannagongdir. Tað verða send trý lið avstað. Fyrst verður sent eitt kjarnulið við níggju limum umleið 8 vikur undan valinum, sum skal hjálpa til at fyrireika valið sum heild. Síðan kemur eitt "long-term" lið fimm vikur undan valinum, sum skal fyrireika valið úti um landið. Tey eru 44 í tali. Linda er við í hesum liðinum.

Beint undan valinum kemur so eitt triðja "short-term" lið at hjálpa teimum, sum longu eru komin. Hesi eru 88 í tali, sum verða í landinum frá 24. til 31. desember. Av hesum eru fýra norðmenn. Tískil verða tilsamans um 140 eyðleiðarar í 64 økjum kring í landinum.

Hetta er nú ikki so nógv, tá hugsað verður um, at í hvørjum øki eru um 600 valstøð. Tískil mugu eygleiðararnir avgera á sjálvum valdegnum, hvørji valstøð teir skulu eygleiða.

Eygleiðarar skulu ikki blanda seg uppí valið, og teir hava ikki heimild til at taka nakra avgerð. Teir skulu bert staðfesta tað, sum teir vita gongur fyri seg. Tað skal soleiðis ikki lurtast eftir leysatíðindum.

Aftaná verður mett um valið fór regluliga fram. Tað sum metast skal um er fylgjandi:

Hava valmyndugleikarnir verið óheftir?

Hava flokkar og valevni havt frítt at hava fundir og at føra fram teirra sjónarmið?

Hava allir flokkar sama møguleika at sleppa framat almennum tænastum?

Hava flokkar og valevni havt javnbjóðis rætt at sleppa framat í miðlunum, serliga teimum almennu?

Hava øll havt javnbjóðis valrætt?

Hava verið onnur viðurskifti, sum kunnu ávirka eitt val? Eitt dømi um hetta kann vera harðskapur.

Hevur mannagongdin við valinum og uppteljing av atkvøðum verið nøktandi?

Beint eftir valið skullu eygleiðararnir geva eina fyribils frágreiðing um valið, og ein mánaða seinni skal gevast ein endalig frágreiðing, har tað eisini kunnu verða givin ráð um, hvussu mannagongdin kann verða bøtt til eitt komandi val.

Væntandi kemur Linda heim aftur um miðjan januar. Hon skal vera við til at gera fyribils niðurstøðuna, áðrenn hon sleppur til hús. Vit kunnu so bert vóna, at hetta fer at gangast væl.

## Spent omma

Ein er tó í Føroyum, sum er serliga spent. Hetta er omman í Vági. Hon hevur javnan samband við Lindu og frættir um, hvussu tað gongst. Hon er sum rímiligt er errin av ommudótrini.

Vit onnur kunnu so bert fegnast um, at ein føroyingur er við til at tryggja fólkaræði úti í heimi, og vit ynskja Lindu eydnu við hennara arbeiði á hesum økinum.

Væntandi fara vit at frætta aftur frá Lindu, hvussu tað hevur gingist og um komandi uppgávur, sum hon verður við til.



*Eisini úr khasibygd. Hesin maður fer við dagsins heyst av betelbløðum tríggjar kilometrarnar á marknaðin. Tað ræður um at bløðini koma fesk á marknaðin*



*Úr eini khashiabygd. Arbeiðarar telja upp betelnøtur, áðrenn farið verður á marknaðin við teimum*



*Kvinna sum arbeiðir á eini teplantagu. Hetta er tann fólkabólkur, sum er ringast staddur av øllum. Lønirnar eru lágar og tey flestu eru analfabetar*



*Omma Lindu, Elisabeth, saman við synunum Dan, pápa Lindu, og André saman við dóttir hansara Barbaru, sum varð konfirmerað í Vági í fjørheyst. Linda uttast t.h. er gumma hennara*